# Havnar Bio

kall Coca-Cola

UMMÆLI:

# Hin besti Harry Potter filmurin

**– Millum drekar og og onnur ódjór. Harry Potter Potter og Flammernes Pokal er hin myrkasti, hin mest spennandi og tann sum er best gjørdur av øllum filmunum um Harry Potter**

**UMMÆLI**
*Kim Simonsen*

Í nýggja filminum »Harry Potter Potter og Flammernes Pokal« byrjar filmurin við, at Harry hevur marruna. Hann gleðir seg tó til heimsmeistaraskapið í Quidditch. Men hesaferð kemur hin óndi Lord Voldemort (Ralph Fiennes), at oyðileggja keppingina við sínum yvirgangi.

Tá næmingarnir koma aftur til skúlan er eingin Quidditchkapping, men í staðin skal Hogwarts kappast við tveir aðrar skúlar um Gandasteypið. Hendan kappingin er í trimum pørtum og setir stór krøv til tey, sum eru við. Kappingin er so vandamikil, at næmingar fyrr eru deyðir av at kappast um henda stóra ódeyðiliga heiður.

Luttakarnir eru m. a. kvinnurnar frá franska skúlanum Beauxbaton, ið eru sera vakrar. Tær eru partvíst wilier, ið eru trøllkvinnur, ið kunnu rúnabinda dreingir. Vinurin hjá Harry, Ron Weasley gerst sera hugtikin av hesum fronsku dullunum, meðan vinkonan Hermione Granger, ið helst er eitt sindur góð við Harry, dámar einki.

Frá Bulgaria koma Durmstrang Skúlin, ið hava hin besta quidditchleikaran í heiminum Viktor Krum við sær. Hendan óføra ítrottamann kemur Hermione tó at gerast eitt sindur áhugað í saman við øllum hinum gentunum.

**Í lívsvanda**
Harry er ikki áhugaður í at luttaka í hesi vandamiklu kapping, men onkur hevur gjørt tað so, at hann tó skal luttaka. Tí logandi steypið sigur tað, og hesin steypur kann ikki taka feil. Hetta ger, at hann við eitt er í lívsvanda og at øði kemur í hinar næmingarnar, ið halda at hann hevur svikað í kappingini. Eisini vinurin Ron gerðst í øðini.

Nú eru Harry, Ron og Hermione komin út yvir barnaárini, tey eru øll við at gerast vaksin og áhugaði í hinum kyninum. Tey eru farin at skeldast og hormonini eru farin at gera um seg.

**At vinna á drekanum**
Fyrsta kappingin er at berjast við ein dreka. Harry velur mest vandamikla drekan. Beistið endar við at slíta seg leyst og fer at flúgva eftir honum kring allan skúlan. Hendan senan í filminum er ein hin mest dramatiska og óhugnaliga. Eisini er hon sera gott gjørd og spennandi.

Lærarnir á skúlanum eru banginir fyri at onkur vil gera seg inná Harry Potter, so tey fáa gandakallin Dunder, ið bert hevur eitt eyga og eitt bein, at hjálpa við at verja Harry.

Sum í øllum ævintýrum, so hevur Harry hjálparar sum gandakallin Dunder, ið er ein ógvusligur og ljótur maður, men sera kønur í at berjast móti teimum, sum hava óndar ætlanir. Eisini Ron og Hermione hjálpa Harry at loysa gáturnar, tí einki er sum tað sær út til at vera.

Í næstu kappingini skal Harry svimja undir vatni í ein heilan tíma í Svarta Sjónum. Har liva løgnar óhugnaligar Grindylowar, ið eru okkurt slag av havfrúgv, hesi ævintýrdjór, eru løgin og lokkandi.

Triða kappingin er tó hin mest vandamikla. Her skulu tey fýra sum kappast um at vinna vegin fram í eini óendaligari labyrint, ið er ein óhugnalig villiniborg, har tey øll verða gandaði.

Kappingin endar við at onkur doyr, men hvør gjørdi hetta og hví?

**So er jólaball**
Harry hevur ikki bert trupulleikar av at skulu berjast við drekar og Grindylowar, eldri næmingum, men eisini av gamla fíggindanum Voldemort (navnið merkir »vold« harðskapur, yvirgangur og »mort« deyði).

Hetta árið skal skúlin eisini halda eitt jólaball, so her er neyðugt, at Harry tekur seg saman og spyrja vøkru Cho Chang (Katie Leung), ið hann



er áhugaður í, um hon vil við honum í ball. Hetta ræðir Harry, eins nógv og alt hitt tilsamans.

**Hin myrkasti filmurin**
Mike Newell (Fire Bryllupper og En Begravelse, Donnie Brasco og Mona Lisa Smile) hevur leikstjórnað Harry Potter og Flammernes Pokal, ið er hin fjórði Potter filmurin.

Enn spælir 15 ára gamli Daniel Radcliffe leiklutin sum Harry Potter, 14 ára gamla Emma Watson er enn Hermione Granger, og hin 16 ára gamli Rupert Grint er aftur hesaferð Ron Weasley.

Persónar sum hin býtti Draco Malfoy, og allir teir gomlu lærarnir eru við. Hesaferð eru tó nógv nýggj andlit, so sum Viktor Krum, Fleur Delacour, Cho Chang, ið øll eru hugtakandi.
Millum tey vaksnu eru nógvir kendir leikarar, so sum Ralph Fiennes (Den engelske patient,
Schindler´s Liste, Sunshine, Spider og The Constant Gartner), ið spælir hin óndi Lord Voldemort. Brendan Gleeson (Troy, Braveheart) er lærarin Dunder. Miranda Richardson (The Hours), er blaðkvinnan Rita Skeeter. Robbie Coltrane er Hagrid. Sir Michael Gambon (Den syngende Detektiv, Kokken, tyven, hans kone og hendes Elsker, Sleepy Hollow og Gosford Park) er Albus Dumbledore. Gary Oldman (Leon, Det femte Element og Batman Begins) er Sirius Black. Dame Maggie Smith (A Room with a View, Richard III, Tea with Mussolini og Gosford Park) er professarin Minerva McGonagall.

Hesin filmurin er hin myrkasti, hin mest spennandi og tann sum er best gjørdur haldi eg. Tá tað kemur til »special effects« er einki spart. Hesin filmurin er av og meiri óhugnaligur og spennandi enn hinir Harry Potter filmarnir. Sjálvt um filmurin er hálvan triða tímar langur, so er ógjørligt at keða seg. Hetta er gott undirhald fyri allar pengarnar. Tí fær hann 5 stjørnur av 6.

Um filmin: Harry Potter and the Goblet of Fire

| | |
|---|---|
| Harry Potter | Daniel Radcliffe |
| Hermione Granger | Emma Watson |
| Ron Weasley | Rupert Grint |
| Rubeus Hagrid | Robbie Coltrane |
| Lord Voldemort | Ralph Fiennes |
| Prof. Dumbledore | Michael Gambon |
| Sirius Black | Gary Oldman |
| Rita Skeeter | Miranda Richardson |

Leikstjóri, Mike Newell. Eftir bók eftir J. K. Rowling. Aldursmark er 11 ár. Frumframsýndur í Havnar Bio fríggjadagin 18. november. 157 minuttir.


TÍðIRNAR:

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu







## A History of Violence

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 18.11 | kl. 22.30 | |
| Leygardag | 19.11 | kl. 22.30 | |
| Sunnudag | 20.11 | kl. 22.00 | |




## Walter & Trofast

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 18.11 | kl. 18.00 | |
| Leygardag | 19.11 | kl. 18.00 | |
| Sunnudag | 20.11 | kl. 17.30 | |




HEIMSFRUMSÝNING

## Harry Potter og flammernes pokal

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 18.11 | kl. 00.04 | kl. 16.30 | kl. 19.45 |
| | | | og | kl. 23.00 |
| Leygardag | 19.11 | kl. 16.30 | kl. 19.45 | kl. 23.00 |
| Sunnudag | 20.11 | kl. 16.00 | kl. 19.15 | kl. 22.30 |




## Doom

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 18.11 | kl. 20.15 | |
| Leygardag | 19.11 | kl. 20.15 | |
| Sunnudag | 20.11 | kl. 19.45 | |

KOMANDI FILMAR:




## Pedderson og Findus 3 - Nissemaskinen

Fríggjadag 25.11 *Frumsýning*

## The Longest Yard

Fríggjadag 25.11 *Frumsýning*

www.bio.fo • Telefon 31 19 56